# Hugnaløta hjá Eysturoyar dansifelag febr. 2009

*Lag : Reyparin*
Á hugnaløtu eru vit nú eftir enn eitt ár.
Sum tíðin flýgur, hetta kundi verið sum í gjár,
vit sótu her í Hæddini - nú aftur lítast skal
og gleðast um, at dansiárið aftur royndist væl.

2. Katrina leiðir nevndina, tað krevur jú sín mann,
so heppið dansifelagið ein slíkan formann fann;
hon leiðir dansin hegnisligt, so ongin fer um koll,
ja lystiliga rungar, tá hon tekur "Leirvíks-Páll".

3. Við Andras' sum næstformanni er framtíðin helst ljós,
sum skipari í dansinum hann dugir seta kós;
sjálvt um hann hóttir við, at hann vil gevast næsta heyst,
vit vænta tó enn rúma tíð at hoyra hansar´ reyst.

4. Hjá "Skrivaranum" dansurin og mentanin er góð,
í skúlanum hann ynskir hetta haldast skal við lóg,
ja fyri dansistevinum hans hjarta hevur brent,
vit mugu velja hann til Føroya Dansipresident.

5. Og Jóan Carl uppletur sína hvøllu torurødd,
ja undir hansar leiðslu mong ein vísan verður kvødd,
tær kvæðakempur fækkast, halda at tað hevur skund,
eitt hugskot er at sleppa honum upp sum kvæðabrund.

6. Við Sámali í Hoygarð´num lætt stevið fer um gólv,
ei um at tala tá hann skipar "Røvararnar tólv";
ein lækni plagdi skipa "Brókatátt" í hesum sal´,
men ikki er hann sæddur síðan síðsta løgtingsval.

7. Vit skjóta upp at nevndin, sitið hevur, heldur á,
hon hevur góða venjing, sleppur tískil ikki frá,
og Jens og Andras keypa bjór - og Brøndum akvavit?
Tað er jú sera bíligt og nógv veikari enn hitt.

8. Og skonkjarin tann sami er, so trúgvur heldur á,
jú Sámal syrgir fyri, øll ein ráka kunnu fá,
at klaksvíkingar eisini her fáa upp í munn,
tí fróðskapurin sigur: lítil kenning bert er sunn.

9. Við Oddfríð og Barberinum og Sofusi og Hans,
øll hava tað til felags, okkum dámar góðan dans;
um Annu, Sannu dámdu best at syngja "Barnatro",
tað kriblaði í Leivuri at skipa "Mallebro".

10. Til Noregs fóru vit ein túr tað gleddi okkum øll,
við bussi koyrdu gjøgnum dal og upp um høgu fjøll;
hjá Bråsnu´n nutu blíðskapin, við Kringen slóu ring,
um dansispælið sigast kann, vit vóru sera kring.

11. Á ólavsøku aftur leiðin gekk so heim til hús,
í dansinum á Norrønu vit vóru øll so fús;
- og samstundis sum Gimpe skipar Ormin upp á rós –
av dekkinum í Viking Club vit seta beina kós.

12. Vit gevast nú at syngja, meðan lagið enn er gott,
men vóna øll at fáa eina rimmar dansinátt;
skjótt Tórir blakar høkjuna, og "Tidrik ta´r til bens",
í veitslulag vit eru øll, alt sláa upp í glens!

Tann 20.febr. 2009, fríggjakvøldið fyri fastalávint, høvdu vit hugnakvøld fyri egnum limum. Húspoeturin ger her viðmerkingar til dansiárið, sum er við at fara. Til borðs vóru vit nøkur og 70 fólk, og eftir borðhaldið komu yvir 40 fólk úr Klaksvík, so tað var, sum poeturin vónaði: Vit fingu eina rimmar nátt. jd.